**TVANGSAUKTION**
På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes
**torsdag**
**den 03. nov. 1994,**
**kl. 11.20**
tvangsauktion, (AS 295/94) over matr. nr. 96, Norðragøta beliggende Norðragøta.

Auktionen er begæret af advokat Fríða Patursson, Fr. Petersensgøta 9, Tórshavn, tlf. 1.1145 (j. nr. 940527) på vegne en pant- og udlægshaver.

Ejendommen er et beboelseshus på en 640 kvm. stor grund. Det bebyggede areal udgør 52 kvm. i 2 etager.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på dommerkontoret.

**Færoernes fogedret,**
*den 10.10.94*
Hans Engell Rhod
dfm.

**TVANGSAUKTION**
På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes
**torsdag**
**den 03. nov. 1994,**
**kl. 10.30**
tvangsauktion, (AS 239/94) over matr. nr. 109, Depil beliggende Depil.

Auktionen er begæret af advokat Jógvan Elletsen, Bryggjubakki 22, Tórshavn, tlf. 1.1260 (j. nr. 38412) på vegne en pant- og udlægshaver.

Ejendommen er et beboelseshus. Det bebyggede areal udgør 121 kvm. i 2 etager.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på dommerkontoret.

**Færoernes fogedret,**
*den 10.10.94*
Hans Engell Rhod
dfm.



# Ætlanir at bora á landi



*Birgir Christiansen*

**ABERDEEN**

*Oljufeløg standa í bíðirøð at hitta Oljuumsitingina við tí í hyggju at sleppa at bora ein kanningarbrunn… á landi*

Sum skilst eru ætlanirnar tvær: annaðhvørt at bora ein nýggjan brunn ella at halda áfram við brunninum í Lopra frá 1981.

Aberdeenblaðið Press and Journal skrivar eisini í dag, at Oljuráðleggingarnevndin undir leiðslu av Árna Olafsson frá danska uttanríkismálaráðnum hevur havt hálvloyniligar fundir í Aberdeen fyrr í vikuni við Amerada Hess, BP Exploration og Statoil. Hildið verður, at ætlanin um at bora ein brunn á landi stóð høgt á skránni fyri fundirnar.

Føroyskar keldur siga, at Lopra-1 brunnurin verður tann fyrsti, tí hann upprunaliga var heilt nær við at koma niður um veldugu basaltplátuna, sum møguliga goymir olju og gassførandi sandstein.

Henda balsaltplátan fjalir stóran part av Føroyaleiðini og kemur nær at Foinaven og Schiehallion, sum eru stóru oljuøkini hjá BP vestan fyri Hetland.

Lopra-1 brunnurin er tilreiðar at nýtast aftur; hetta arbeiðið varð framt av Western Atlas í summar.

Av øllum hesum kemur fram, at oljufeløg hava ætlanir um at kanna og framleiða olju í Føroyum so bíliga sum til ber.

Fyribils úrslitini frá seismisku kanningini, sum Western Geophysical hevur framt fyri landsstýrið í summar, sigast vera lovandi. Martin Heinesen frá Oljuumsitingini er endurtikin fyri at siga »There is encouragement in the data being received« og víðari at tað lutvíst ber til at siga hvussu jarðfrøðin undir basaltinum og at tað sær lovandi út.

Væntað verður, at fullfíggjaðar upplýsingar frá seismisku kanningunum verða tøkir tíðliga komandi ár.

Fyrsta útbjóðingarumfarið kann byrja so tíðliga sum 1996 um rættulig framstig verða gjørd, serliga viðvíkjandi marknatrætuni millum Bretland og Føroyar.

Tað er bert nýliga, at møguleikarnir viðvíkjandi Norðuratlantshavi eru komnir í ljósmála. Oljan, sum oljufeløg eru komin fram á vestan fyri Hetland, tykist vera partur av atlantiska »Western Slope« fyribrigdinum, sum gongur frá leiðunum vestan fyri Írland framvið Føroyum til Voring-karið við Noreg og kanska víðari norður til Lofoten.

Statoil hevur sagt, at størstu vónirnar um at finna olju á »Western Slope« eru á Føroyaleiðini.

Um hugt verður at bretska partinum, so er møguleiki fyri milliardvís av tunnum av olju, sambært Smith Rea Energy Analyts og at sannlikt er, at í minsta lagi 9 oljuøki, sum hava vinnuligan týdning, verða funnin afturat. Hetta tal kann møguliga verða so høgt sum 45, segði James Hargreaves frá Smith Rea á ráðstevnuni í Aberdeen mánadagin.


# TILBOÐ

**Upp til ÷30% avsláttur uppá allar meturvørur**

**KATRINA** (Tlf. 11524)
**CHRISTIANSEN**
*TOYSTOVAN*





**Kvinnuhúsið**

**Ráðgevingin hjá Kvinnuhúsinum er opin hvønn hósdag frá kl. 19.00–21.00, inngongd hjá KFUM, Oman Pisuvarða 2, ella á tlf. 17200.**

**Kvinnuhúsið er opið gerandisdagar frá kl. 14.30–16.30. Telefonin, 17200, svarar hvønn dag frá kl. 14.30–7.00 á morgr.i.**



*Njáll og Georg*
**Bergmenn**
*– veitslutónleikur til tann ljósa morgun!*
*tel. 1-9194*



**FLETTING**
Eg bjóði mær til at fletta fyri fólk í Havn. Prísur: lomb 150 kr., veðrar 200 kr., tó alt eftir stødd. Við í prísinum er eisini vasking av vembrum.

Ringið **tlf. 17635,**
*eftir arbeiðstíð*


**TVANGSAUKTION**
På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes
**torsdag**
**den 03. nov. 1994,**
**kl. 11.50**
tvangsauktion, (AS 3/94) over matr. nr. 122 d, Klaksvík beliggende Burnshamarsvegur.

Auktionen er begæret af advokat Fríða Patursson, Fr. Petersensgøta 9, Tórshavn, tlf. 1.1145 (j. nr. 940068) på vegne en pant- og udlægshaver.

Ejendommen er et beboelseshus på en 537 kvm. stor grund. Det bebyggede areal udgør 158 kvm. i 1 etage.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på dommerkontoret.

**Færoernes fogedret,**
*den 10.10.94*
Hans Engell Rhod
dfm.